gult4 cyan4 magenta4 svart4

Lesiveik sópað undir teppið

- Ongin hjálp er at fáa. Skúlin dugir ikki at meta um trupulleikan, foreldur verða ikki tikin fyri fult og børnini eru tapararnir, sigur Anna Karin Kjeld, stigtakari til stovnan av stuðulsfelag fyri børn við lesitrupulleikum

STUÐULSFELAG
Turið Kjølbro

Umleið 2-3 børn í hvørjum skúlaflokki hava lesitrupulleikar

Savnsmynd

Leygardagin komandi verður stuðulsfelag fyri børn við lesitrupulleikum stovnað í MBF-Húsinum í Havn. Upprunaliga skuldi stovnandi fundurin vera fyri sløkum mánaði síðani, men mátti orsakað av verkfallinum útsetast. Tikið stig til stovnanina hevur Anna Karin Kjeld í Funningsfirði.

- Táið tað snýr seg um at hjálpa børnum, sum hava lesitrupulleikar, eru Føroyar eitt sera tilaftur skomið land. Eingin veit, hvussu hesi børnini kunnu verða hjálpt. Skúlamyndugleikar og aðrir myndugleikar duga ikki at meta um trupulleikan, eingin hjálp er at fáa nakra staðni og børnini eru tapararnir. Hesi børnini verða sópað undir teppið, eisini av lærarum, sum í ov langa tíð halda, at alt fer at laga seg. Skulu hesi børnini fáa munadygga hjálp, skal skjót og góð hjálp setast inn. Men vit síggja, at tímatalið verður skert, at eykatímarnir til børn við serligum tørvi gerast færri og tað ger støðuna bara nógv verri, sigur Anna Karin Kjeld.

Anna Karin Kjeld tosar av royndum.

- Fólk tora ikki rættiliga at tosa um hesar trupulleikarnar, men nú nógv hava frætt um, at eitt stuðulsfelag er í umbúna, hava í minsta lagi eini hálvt hundrað fólk ringt til mín. Og stórt sæð øll eru í somu støðu. Tey verða ikki tikin fyri fult av skúlanum, samstundis sum helvtin av foreldrunum vísa á, at børn teirra ikki hava fingið eykatímar.

Hon vísir á, at uml. 2-3 børn í hvørjum skúlaflokki hava lesitrupulleikar.

- Í onkrum førum fáa næmingar eina rúgvu av tilfari, sum er ætlað sum hjálp, men eingin spyr ella leggur í, um nakað úrslit kemur burturúr. Tað er rætt og slætt einki skil á. Alt gott um, at føroyski fólkaskúlin er fyri øll, men tað nyttar lítið, táið karmarnir ikki eru í lagi. Skúlin er als ikki førur fyri at taka sær av øllum børnum, sum hava trupulleikar, og tað gongur út yvir øll.

Endamálið við stuðulsfelagnum er fyrst og fremst at savna foreldur at børnum við lesitrupulleikum saman.

- Vit hava tørv á at koma saman og tosa um trupulleikarnar og hjálpa hvør øðrum. Sum foreldur kenna vit okkum ógvuliga einsamøll í so máta. Síðani kunnu vit arbeiða fram ímóti at ávirka myndugleikarnar soleiðis, at eitthvørt verður gjørt fyri hesi børnini.

Anna Karin Kjeld vónar, at nógv foreldur at børnum við lesitrupulleikum møta á stovnandi fundinum. Við á fundinum vera eisini lærarar, sum arbeiða við børnum, ið eru lesiveik, sálarfrøðingar, heilsusystrar og sjúkrasystrar, sum fara at lýsa trupulleikan.

- Beint eftir summarfrítíðina fara vit til arbeiðis, og vit helma ikki í, fyrr enn okkurt munadygt verður gjørt fyri hesi børnini, sum hava lesitrupulleikar.

Stovnandi fundurin í MBF-Húsinum í Havn verður kl. 15.00.

Pinkalítlar gerandissøgur

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út barnabókina "Eg eigi" eftir Steinbjørn B. Jacobsen við myndum eftir Bárð Jákupsson

BØKUR
Turið Kjølbro

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út barnabókina "Eg eigi" eftir Steinbjørn B. Jacobsen. Bárður Jákupsson hevur teknað myndirnar í bókini, eins og kápumyndina sum er í litum.

Henda bókin breðgur eitt sindur frá tí vanliga. Hon minnir ikki sørt um Miu og Dia, sum í fleiri ár hevur verið brúkt í skúlanum sum lesibók í teimum yngstu flokkunum. Tað sum eyðkennir bókina er, at fá orð verða brúkt til at gera eina pinkulítla gerandissøgu, sum børnini hava lætt við at kenna aftur, og sum er løtt at lesa. Hesar søgur kunnu eisini stuðla børnum til sjálvi at skapa okkurt líknandi, av tí at tær stuttu og einføldu søgurnar saman við frálíku teknningunum kunnu birta upp undir barnsins hugflog og skapanarevni. Tónin í øllum søgunum er lættur og skemtingarsamur.

Aftast í bókini eru fýra barnasangir við nótum. Hóast bókin ikki er partur í Snípurøðini við lættlesibókum, hevur hon tann gula "snípulitin" til byrjanarstig og hóskar vegleiðandi sum framíhjálestur í 2. og 3. flokki fólkaskúlans. Teksturin er skipaður soleiðis, at bókin skal vera lættari at lesa hjá teim yngstu børnunum í fólkaskúlanum

"Eg eigi" er 56 blaðsíður og kostar 48 krónur.

Ávegisskriving til sætta flokk

Triðja og seinasta bókin í røðini "Kom og skriva" er nú komin

BØKUR
Turið Kjølbro

Røðin "Kom og skriva", sum Føroya Skúlabókagrunnur gevur út, byggir á ávegisskriving, sum hevur til endamáls at økja um skriviførleika og skrivigleðina hjá einstaka næminginum. Birgit Arge og Lydia Didriksen, sum báðar eru lærarar, hava skrivað og Edward Fuglø hevur myndprýtt.

"Kom og skriva 3" er ætlað 6.-7. flokki. Fakliga er hon framhald av teim undanfarnu bókunum. Evnini í henni eru viðkomandi og ein avbjóðing fyri tann aldursbólk, sum hon er ætlað. Í "Kom og skriva 3" er serligur dentur lagdur á at gera næmingarnar tilvitaðar um ymisk tekstsløg.

Bókin er í 6 høvuðsportum. Til næmingabókina er lærarabók við hugskotum og leiðbeining.

"Kom og skriva 3" er 120 síður, hon kostar 140 krónur. Lærarabókin er 65 síður og kostar 84 krónur. Hestprent hevur umbrotið og Repro-Z hevur gjørt reproarbeiðið.

Móttøka

Í hesum døgum eru 30 ár liðin síðani
Matstovan Muntra
í Fuglafirði læt upp.

Í hesum sambandi verður móttøka
hósdagin 14.06. kl. 14–17.00
á Muntra.

Øll eru vælkomin!

gult5 cyan5 magenta5 svart5